# Eitt gott boð upp á ein vakran málning

**Tey, ið ynskja at ogna sær ein gott listaverk, og samstundis ynskja at stuðla tí ítróttarliga arbeiðinum í Fuglafirði, fáa eitt gylt høvi til hetta sunnukvøldið. Tá skipa ítróttarfeløgini fyri uppboðssølu av níggju listarverkum**

UPPBOÐ
*Snorri Brend*

**Fuglafjørður:** Tað er ikki á hvørjum degi, at ein hevur møguleika at bjóða uppá ein málning eftir kendum listamálara.

Men sunnukvøldið er tað júst hetta sum fer at sermerkja eitt av mongu tiltøkunum á varmakeldustevnuni um vikuskiftið.

Hetta kvøldið verður nevniliga høvið hjá fólki at bjóða uppá málningar, sum ikki færri enn átta listafólk úr býnum og ein úr Havn hava latið úr hondum.

Tað hevur nevniliga eydnast umboðum úr ítróttarfeløgunum í Fuglafirði at fáa níggju navnfram listafólk at lata málningar til hesa uppboðssøluna.

– Vit spurdu tey um hetta, og vit fingu játtandi svar frá teimum beinanvegin, sigur Kristbjørg Petersen, sum saman við Poulu Reinert Petersen m.a. hevði hesa uppgávuna.

Innkomnir peningurin fer allur til at stuðla ítróttinum í býnum.



*Mong vøkur motiv eru í Fuglafirði. Helst verður okkurt listaverk higani á uppboðssøluni sunnukvøldið, sum m.a. Kristbjørg Petersen hevur fyrireikað. - Tað var eingin trupulleiki at fáa fatur á listaverkum, sigur hon*

Mynd:: Jens Kristian Vang

### Til øll feløgini

Hetta er kortini ikki fyrstu ferð, at fólk soleiðis hava møguleika at bjóða uppá málningar í Fuglafirði.

Eitt líknandi tiltak sum hetta varð fyriskipað á varmakeldu í fjør. Tað eydnaðist so mikið væl, at fyrireikararnir hava hug at royna tað enn einaferð.

Í fjør vóru ongir trupulleikar at fáa fatur á listaverkum, og heldur ikki teir stóru trupulleikarnir at fáa teir seldar. Tá stóð tingmaðurin Tobbi fyri søluni.

Í so máta fær fuglfirðingurin Kristian Martin Petersen heiðurin at standa fyri uppboðssøluni í ár. Og væntað verður, at hann eisini fer at megna hetta til fulnar.

Allur tann innkomni peningurin fer til at stuðla svimjifelagnum, fimleikafelagnum og tí víttfevnda arbeiðinum, sum verður gjørt innan ÍF.

## Níggju nýggir málningar

Til uppboðssøluna sunnukvøldið hava fyrireikararnir fingið listarverk frá íalt níggju listafólkum. Tey eru:

- Heðin Kambsdal
- Øssur Mohr
- Ian Øre
- Jógvan Kristiansen
- Bernhard Samuelsen
- Randi Gunnarsdóttir
- Amariel Norðoy
- Bjørg Mohr Andersen
- Hans Mohr




Fuglafjørður

býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak
býurin, har náttura og fólk eru blíð
býurin, har fortíð og nútíð hittast
býurin, har øldirnar tala

**Stutt sagt:**
býurin, har nógv hendir
býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar Kommuna**
P.O. Boks 30, Tel 444006, Fax 444657
fko@fuglakomm.fo, www.fuglakomm.fo

**Kunningarstovan í Fuglafirði**
á Bug, FO-530 Fuglafjørður
Tel 444860 - Fax 445180
t-postur: infoey-f@post.olivant.fo

**Fuglafjarðar Bókasavn**
á Bug, FO-530 Fuglafjørður
Tel 444745 - Fax 445180
t-postur: bokasavn@online.fo